# At ferðast í toki er deiligt



*Tú hittir altíð vinarliga ferðafólk í toki, her eru stórasystir og lítlibeiggi á veg til hús eftir at hava vitjað pápan, sum býr í Hull.*

*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Hesi dagbókabløð í tveimum pørtum eru skrivað umborð á tokinum millum Hull og Aberdeen seinasta sunnudag. Hetta eru tankarnir, sum fóru gjøgnum høvdið, teir tíggju tímarnar tað tók at koma norður til Aberdeen sunnudagin. Tankar, sum neyvan høvdu verið festir niður á blað, um eg hevði sitið millum kend fólk og práta. Tað er eisini sjarmerandi at ferðast einsamallur, og ongan kenna. Dagbókin er skrivað við vanligum kúlupenni niður á ein lítlan A7 blokk við útgávu fyri eyga og fer óhøvlað í blaðið, annars hevði ikki verið talan um nakra dagbók**

**1. partur**

BROT ÚR DAGBÓKINI

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

**Sosialurin, Skotland:** Klokkan er farin av tvey seinnapart, tokið fer klokkan hálvgum trý, og best er at vera í góðari tíð. Her er lítið fólk á jarnbreytarstøðini í Hull í dag, eg eri á veg upp til Aberdeen og verið frammi einaferð í kvøld, nær veit eg ikki. Tað er sunnudagur, tann seinasti í juni. Tokið er ikki komið enn. Eg eri ikki einsamallur sum bíði. Ein pápi stendur eisini og bíðar og hjá honum trý børn. Ein 12 ára gomul genta og síðan tveir dreingir, annar um níggju og hin um skúlaaldur. Gentan gongur við berum búki og ringi í nalvanum, hon sær so deiliga eingilsk út. Hon tegir ikki og sjálvdan í frið. Hon minnir um eina vanliga dominerandi stórasystir, sum skal bestemma yvir beiggjunum. Men tað er bara lítlibeiggin hon hevur vald á, hin eldri letir seg ikki stýra av systrini.

Á perongini standa tvey og siga farvæl. Tað er gentan sum skal út at ferðast. Tey mussast og klemmast, sum tað er seinastu ferð tey síggjast. Gráta og tára, meðan klokkan á jarnbreytarstøðini eirindaleyst telir sekundini til endaliga skilnaðarstundin skilir tey. »See you next week!« hoyri eg hana rópa út gjøgnum hurðina, tá hon kemur inn í tokið.

### The Ratdog

Pápin sigur eisini farvæl nú, og hansara harða útsjónd hóskar slett ikki saman við teim rørdu kenslum, hann nú vísir. Hann hevur tatoveringar allastaðni. Og blusan, hann er í, minnir mest um tað besta grafittilistin hevur at bjóða. Framman og aftan yvir bringu og herðum stóð við stórum stavum, RATDOG, ið merkir rottuhundur. Eg kom at sita mótsættu megin børnunum, tosaði eitt sindur við tey, tók eina mynd av systrini og lítlabeiggjanum. Stóribeiggin sat eina heilt aðrastaðni, longur frammi í tokinum. Tey vóru á veg til mammu sína í Selby, einum lítlum býi nakað sunnanfyri York. Tey søgdu mær, at pápin lærdi seg danskt, og spurdu meg, um Danmark ikki var landið, har tey tosaðu danskt.

So ljóðar eyðkenda floytið og jarnhjólini fara at mala, fyrst spakuliga og síðan skjótari, meðan ferð kemur á. Klonk, kliklonk, klilkonk, klonk, kliklonk, kliklonk o.s.v.

Tað er sunnudagur, tann seinasti í juni í ár, summar er í luftini. Eg havi verið á ferð síðan 25 mai. Í Danmark, í Grønlandi, aftur í Danmark og nú í Bretlandi, har eg havi vitjað Hull og Grimsby og eri nú á veg til Aberdeen.. Eg fylgi slóðini hjá Kaj Johan Johannesen, sála, úr Hvannasundi, sum eg skrivi ævisøgu um. Í hesi løtu eri eg á veg gjøgnum vakra Yorkshire landslutin, og vit steðga akkurát í Broough, ein pinkulítil býur, sum neyvan er nevndum á einum vanligum landakorti. Her var slett ikki neyðugt at steðga, tí støðin var manntóm, tá vit komu og ongin steig av tokinum.

### Valmúur

Nógvur seyður er at síggja uttanfyri. Klokkan er 14.45, og vit hava koyrt í eitt korter, vit hava framvegis stóru Humberánna í bakborð. Valmúurnar standa so vakrar og orangereyðar framvið jarnbreytini. Eg eri ikki nakar plantukennari, men valmúan er so vøkur, at eg einaferð á veg úr Hamburg til Berlin í toki, og tað var eisini hesa tíðina av árinum, mátti spyrja hvussu hendan blóman varð kallað. Tað er tí eg veit tað nú. Her eru eisini nógvar violettar blómur, men tær kenni eg ikki navnið á, tær eru vakrar og eg veit, at tær einaferð í fyrndini vóru í huganum hjá Várharra, ella ein tanki hjá Gudi og tí síggja tær soleiðis út í dag.

Vit koyrdu júst fram við jarnbreytarstøðini Cave, men hon er so lítil, at tokið slett ikki steðgaði á. Tað sær út til, at hendan støðin ikki verður brúkt í dag, tí í urtagarðinum aftanfyri støðina sótu fólk og hugnaður sær til borðs úti við grillmati, og tað sá út sum tey búðu á støðini..

Tað er sunnudagur og uttanfyri er lendið slætt sum ein pannukøka. Fái altíð ein klump í hálsin, tá eg síggi einlig foreldur siga børnunum farvæl. Havi prøva tað alt ov ofta sjálvur og kenni djúpa samkenslu við børnum og foreldrum. Vit vaksnu eru mangan ein ábyrgdarleysur skapningur og tornin í kjøtinum, tann sátans eingil, sum Paulus tekur til, verður helst sitandi, so leingi lív er á foldum.

Lendið er framvegis slætt og vakurt. Onki er sum at ferðast í toki. Her sær tú nakað, her hevur tú stundir at hugsa um tað tú sær. Áðrenn eg skrivi tað næsta, so má eg líka minna meg á, at mín sannleiki er ikki neyðvendigvís sannleikin hjá einum øðrum. Eg hugsi um hvussu nógvir av mínum landsmonnum ferðast. Tað er Danmark og Danland, Tivoli og Bakkin. Ella ein yvirhitað strond sunnanfyri og hotel, hvørs aðal-mál er at gera uppihaldið sunnanfyri so líkt tí heima sum møguligt. Hjá mongum dønum hevur tað líka nógv at siga um ein kann fáa frikadellur og fleskasteik á hotellinum í Spania, sum tað at sólin sær, og at ein nemur sær fremmanda mentan.

Men heimurin hevur nógv annað at bjóða, og ein tokferð kann vera eitt upplivilsi í sær sjálvum.

### Rúmsátt

Vit eru bara fimm fólk inni í vogninum nú. Her er rúmsátt. Børnini fóru av í Selby, ein lítil býur, sum einaferð hevur sæð betri dagar, tí eg síggi, at hann hevur ikki færri enn tvær jarnbreytarstøðir. Vit koyra júst fram við Selby West. Tá jarnbreytirnar komu fram í 19 øld, og tær komu sjálvandi fyrst í heimsveldinum Bretlandi, her ídnaðarkollveltingin byrjað, vóru bilarnir ikki komnir og tá teir komu, tey fyrstu mongu árini, vóru teir so dýrir, at bert yvirklassin hevði penging fyri teir. Tokið varð einasti samferðslumøguleikin til hópflutning. Tí fekk ein so lítil býur sum Selby heilar tvær støðir, har Selby West er niðurløgd í dag.

Akkurát nú er ringur roykur inni í tokinum. Luktar av rotnum fiski, minnir um Havsbrún í Fuglafirði í gomlum døgum. Her er eisini ídnaður og eg síggi rúkandi skorsteinar ymsastaðni í lendinum.

Í erva, uppi í tí bláa, luta flugvarar himinin upp í puntar, eitt brúgvalag er helst á veg, tí sæst dampurin frá útstoytinum, sum beinar linjur. Flúgving er ikki longur tað upplivilsi fyri meg, sum tað var í fyrstuni, tá eg fyrstu ferð sat í flugvara í september í 1974. Eg trúði heilt erligt, at mín seinasta løta var komin og hevði absolutt ongar vónir um at lenda aftur heilskapaður. Kanska var tað tí , at deyðin var so nærverandi og óskiljandi í lívi mínum hesa tíðina, men tað er ein onnur søga. Síðan er flúgving vorðin ein vani, men eg sveitti enn eitt sindur, hevur flúgvarin hug at rulla og eg kenni framvegis deyðan í næsunum ein illveðursdag yvir Sørvágsfirði. Men eg vil síggja og bíleggi altíð, tá eg minnist til tað, vindeygapláss. Eg haldi tó ikki , at tað er so nógv longur, sum mann kann síggja í einum flúgvara. Tá tú er komin upp í hædd, so eru einir 8-10 kilometrar millum tað tú sær og teg sjálvan, og tá skal tað vera nokk so stórt, fyri at tú skal kunna skyna á. Um tað ikki eru høg fjøll og jøklar undir, so líkist lægra lendið nógv, har tú ferðast kring heimin.

Tokferðir eru annarleiðis. Tú hevur samband við jørðina. Akkurát nú sá eg mett neyt liggja og jótra og ein tarv halda aldargamlan nálgandi sið. Í flokkinum er friður og alt er sum tað skal vera. Neytini liggja og jótra á ljósgrønum bøi og verndartrø kring líva. Úr flogfari hevði hendan sjón sæð út sum eitt pinkulítið grønt írskt frímerki, um ikki skíggj vóru í millum, væl at merkja.

### Grin enn tonic

Eg havi skift tok og vit koyra norður eftir. Tað er Midland Mainline sum rekur hendan teinin millum York og Edinburg. Í Bretlandi eru jarnbreytarfeløgini privat. Tað syrgdi Margareth Thatcher fyri. Brúkarin er bestemt ikki nøgdur við hetta, tí tænastan er vorðin munandi vánaligari og nógv dýrari. Margareth Thatcher er júst vorðin einkja. Maður hennara Dennis doyði í vikuni 88 ára gamal. Bløðini gjørdu nógv burturúr og okkurt av teimum stóru bløðunum. eg haldi tað var The Sun, skrivaði á forsíðinu, at hann var hennara Grin and Tonic, tað merkir látur og tonic, so hann má hava verið ein skemtiligur maður.

Hetta er eitt bumlitok og vit skulu steðga nógvastaðni. Klokkan er akkurát farin av fýra og vit verða væntandi frammi í Edinburg klokkan 19.50 ella um hálvan triðja tíma.

Vit steðgaðu eina løtu í York, ein góðan hálvan tíma, har vit bíðaðu eftir næsta tokinum og onkur sum eg sá í Hull, er eisini við her. York er ein aldargamal býur, ein søguligur býur, okkara forfedrar, víkingarnir hildu til her. Her var biskupsæti og her er enn ein rúgva av spøkilsum. Tey eru so vanlig her, at ferðastovurnar bjóða spøkilsisferðir, við sokallaður medium, tað eru fólk, sum duga at fáa samband við tey deyðu, sum ferðaleiðara. Akkurát sum í donsku sendingini Vald Andanna og forrestin í tí føroysku, sum kom nakað aftaná. Bederbrøðurnir høvdu fingið sína sak fyri í York. Eg standi inni á ferðavinnustovuni á jarnbreytini í York og forvitnis. Ferðaleiðarin til spøkilsisferðirnar í York í dag eitur Molly, ein útstrálandi mystisk kvinna, minnir mest um eina sintiromana, eina sigoyniska spákvinnu og hon hevði nokk fyri langari tíð síðan verið brend á báli, livdi hon fyri nøkrum hundrað árum síðan. Í York siga tey, at tað er ikki ein spurningur um tú trýr upp á spøkilsir, tað er meira ein spurningur, um tey trúgva upp á teg.

Jarnbreytin vit koyra á nú er óslættari og her er ringt at sita og skriva. Teldutøknin er frammalaga í dag, men tað er eisini deiligt at sita við einum heilt vanligum penni og einum lítlum blokki í A7 støðd og skriva.

Í York vóru nógv fólk á jarnbreytarstøðini og øll gjørdu tað sama sum eg, tey bíðaðu. Tó var ymiskt hvussu fólk bíðaðu. Summi sótu bara, onnur prátaðu og fleiri drukku øl. Bretar drekka nógv sjónligari enn føroyingar. Teir drekka allastaðni og teir drekka nógv øl, men ikki sterkt øl. Og dagliga bjórdrekkaríið sæst eisini. Fólk slítast og eldast skjótari. Fólk hava búk, yngri sum eldri og tað er ikki óvanligt at síggja ungar gentur við ølbúki, men tað leggja tær sektina á. Í Bretlandi lata fólk seg í, akkurát sum tað passar teimum, og konufólkið er ikki bangið fyri at vísa beran búk og nalva og hvørja dellu, meðan tær svinga í stramtsitandi crepe-elastiskum klæðum. Hugtakið yvirvekt, sum mótavinnan definerar rínir ikki við.

### Roykivognur

Eg eri komin av tilvild at sita í einum roykivogni og her er væl av royki inni, fólk guva, sum tað er tann seinasti guvurin tey fáa. Ein situr beint yvir av mær. Hann hevur eina blikktubbaksdós uppi á sær. Hon er slitin og tað er neyvan sama merki at tubbaki í dósini, sum tá hon var nýggj og jomfrúulig. Hann rullar hegnisliga og brúkar grøna Rizla bók. Komið at hugsa um pápa, sum roykti seg í hel fyri trimum árum síðan, 69 ára gamal. Størri nikotinelskara og njótara havi eg ongantíð møtt. Niðan fyri tær 40 um dagin var hann ongantíð, tey 50 árini hann ríkaði heimsins tubbaksídnað og okkara landskassa, sum uttan samvitsku spekulerar í mannsins turrelvandi vanmátti. Pápasa royking man hava fíggjað ein part av landsins veganeti. Pápi roykti so illa, at tá hann endiliga fekk aldursrentu, eftir 50 ár á sjónum, so var tað ikki meira enn fyri tubbak.

Vit eru í Darlington nú og ongantíð læri eg at pakka eitt kuffert við skili. Tað stendur aftanfyri meg og vigar langt yvir loyvdu vektina. Eg verið nokk noyddur enn einaferð at rinda fyri yvirvekt í flogfarinum. Tað gjørdi eg í Nuuk fyri 14 døgum síðan. Havi ampa av kuffertinum, men uggi meg við, at tað skal sterkur maður til at stjala tað.

Var í kirkju í dag í Hull og aftan á gudstænastuna greiddi ein eldri kona mær frá, at sunnudagur var ringasti dagur at ferðast við toki. Sunnudag umvæla teir vanliga jarnbreytina og tað er ikki óvanligt, at man verður koyrdur úr tokinum ávísar teinar og má ferðast í bussi og so aftur í tok. Hon tók mótið frá mær eina løtu. Eg kundi rokna við at gerast nógvar tímar seinkaður, um eg í heilatikið kom fram. Eg kundi eisini havt flogið frá Humberside, tí tað er faktisk bíligari. Ein flogbilett kostar 80 pund, tað er 800 krónur, meðan ein tokbilett kostar 85 pund.

Eg vildi við toki, og nú siti eg her og skoði hetta vakra lendið, sum nú er vorðið meira bakkut og enn vakrari. Nógvur seyður er at síggja og hann er nýroyttur í sólini. Tað er sunnudagur, sólin skínur, heiður himin og tað er friður yvir okkum her í Norðuronglandi, nú vit nærkast Newcastle og eg so smátt havi vant meg við tubbaksroykin. Ross ganga á beiti og fyl hava tveitt seg skerfløt í sólini. Børn vassa í eini á vit koyra framvið, hetta er sanniliga eitt paradis eg koyri í gjøgnum.

Hetta er bara í fínasta ordan, eg eri her, her og nú og ongin myrkur tanki um eina framtíð, sum ikki er komin, ella eini fortíð sum er farin og ongantíð kemur aftur, má sleppa at órógva hesa løtuna. Løtan her og nú, tann einasta sum eg eigi.

Klokkan er fimm, nú møttu vit einum toki, einum stuttum, Tað setti í vognarnar, tá tað fór framvið við nógvari ferð. Munnu tokførarar heilsa upp á hvørjar aðrar, tá teir møtast, líka sum bussførarar gera í Føroyum. Tit vita, eitt lítið avmált nikk og so hørgu hond akkurát so nógv upp frá rættinum, at tann mótkoyrandi sær hana og ikki ein millimetur meira. Eg veit ikki, havi ongantíð verið í førarahúsinum á einum toki, heldur ikki tá tvey tok hittast.

*framhald í næsta blað*